**FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 27. februar 2024
J. nr.: 24/03890
Viðgjørt: TM

**Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-091/2023 frá Árna Skaale, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um ferðavinnu.**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar stuðulsskipanir, beinleiðis ella óbeinleiðis, eru, sum ferðavinnan fær gagn av?

2. Hvussu nógv hava hesar skipanirnar kostað seinastu 10 árini, býtt uppá ár?

3. Hvussu nógv roknar landsstýriskvinnan við, at ferðavinnan rindar í landskassan í ár?

**Svar:**

**Til nr. 1**
Fyrst er at siga, at hugtakið *ferðavinna* fevnir um bæði innkomandi ferðavinnu (*incoming*), útgangandi ferðavinnu (*outgoing*) og um innlendis ferðavinnu. Til ber ikki fullkomiliga at skilja innkomandi ferðavinnu frá útgangandi ferðavinnu í hagtølum og uppgerðum av til dømis virðisøking og ársverkum í vinnuni. Heldur ikki ber til at skilja innlendis ferðavinnu í Føroyum frá tí ferðavinnu, sum veitir tænastur til útlendsk ferðafólk í Føroyum. Flestu veitarar innan ferðavinnuna veita tænastur bæði til fastbúgvandi í Føroyum, tá ið hesi ferðast í egnum landi, og til útlendsk ferðafólk í Føroyum.

Fíggjarmálaráðnum kunnugt eru ikki aðrar stuðulsskipanir, sum ferðavinnan fær gagn av, enn undantøkini í §2, stk. 3, litra litra n) og §12, stk. 1, litra h) í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald. Talan er um undantøkini í meirvirðisgjaldi fyri virksemi sum ferðaleiðari, ferðamannastovuvirksemi og ferðamanna leiðbeiningarvirksemi og upplýsingarvirksemi og fyri útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.tíl. og útleigan av kampingplássi.

Nevnast kann eisini, at játtanin til P/F Visit Faroe Islands er um 20 mió. kr. árliga. Virksemið hjá P/F Visit Faroe Islands er í samstarvi við ferðavinnuna og Uttanríkis- og vinnumálaráðið at menna Føroyar sum ferðavinnuland, at kunna um og marknaðarføra Føroyar sum ferðavinnuland og at menna vinnuferðavinnu. Játtanin hjá P/F Visit Faroe Islands fevnir eisini um eina stuðulsskipan, sum kommunur kunnu søkja úr, til at menna undirstøðukervi fyri ferðavinnu o.a.

Nevnast kann, at øll onnur framkomin lond hava líknandi stovn sum almenna P/F Visit Faroe Islands við endamálinum at kunna um og marknaðarføra landið altjóða sum ferðamál og ferðavinnuland. Hildið verður, at kunning um og marknaðarføring verður gjørt á bíligasta og effektivasta hátt, um átøkini eru samskipað og einsháttað av einum almennum stovni heldur enn av nógvum ymiskum veitarum.

Harafturat kann nevnast, at ikki bara ferðavinnan fær gagn av skipanunum, sum eru nevndar omanfyri. Til dømis fáa føroyingar, sum leiga kømur á gistingarhúsum, ella útlendingar í arbeiðsørindum í Føroyum, eisini ágóðan av frítøkuni í meirvirðisgjaldinum fyri útleigan av kamari á hotelli, gistingarhúsi o.tíl. (innlendis ferðavinna v.m.).
Viðmerkjast skal eisini, at nógvar ymiskar vinnupolitiskar skipanir eru í Føroyum, sum flestu av høvuðsvinnunum onkursvegna fáa gagn av. Nevnast kunnu ymiskar vinnupolitiskar skipanir, sum til dømis landbúnaður, fiski- og alivinna og skipasmíð fáa gagn av. Einki bendir á, at ferðavinnan fær gagn av fleiri tílíkum skipanum, sammett við skipanir, sum aðrar vinnur í Føroyum fáa gagn av.

At enda kann nevnast, at inntøkurnar til landskassan frá verandi ferðaavgjaldi á kr. 65 fyri hvønn ferðandi úr Føroyum vóru um 14 mió. kr. í 2023. Hesar inntøkurnar stava bæði frá innkomandi og útgangandi ferðavinnu og frá fastbúgvandi og útlendingum, sum ferðast í arbeiðs- og í øðrum ørindum, til dømis í sjúkraørindum o.a.

**Til nr. 2 og nr. 3**
Spurningarnir nr. 2 og 3 kunnu ikki svarast. Hagtøl eru ikki tøk, sum vísa kostnaðin av hesum skipanunum býtt á ár. Harafturat ber ikki til at býta kostnaðin av skipanunum á ferðavinnu og á aðrar vinnur innlendis, sum eisini fáa gagn av skipanunum. Heldur ikki ber til at meta um, hvussu nógv ferðavinnan fer at rinda í landskassan í ár. Eins og nevnt omanfyri ber heldur ikki til at skilja innkomandi ferðavinnu frá útgangandi ferðavinnu og frá innlendis ferðavinnu.

Nevnast kann, at í 2023 vóru um 142 tús. kamarsnætur skrásettar á føroysku gistingarhúsunum sambært uppgerðum hjá Hagstovuni. Kamarsnætur telja, hvussu nógv og hvussu leingi kømur verða brúkt. Um 10 fólk gista í 5 kømurum í 3 nætur, eru hetta 15 kamarsnætur. Siga vit, at hvørt kamar kostaði 7-800 kr. í miðal í 2023, gevur hetta eina bruttosølu á 100-110 mió. kr. Hevði meirvirðisgjald á 25% verið rindað av hesum, hevði talan verið um 25-30 mió. kr.

Tinganes, 27. februar 2024

**Ruth Vang**
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum